# Almenn tiltøk í samband við vitjanina hjá Richard Bauckham

## Mánadagin 23.08

20:00 Fyrilestur: *Trúgv, náttúra og margfelda lívið* ("Theology and Biodiversity"). Fyrilesturin verður í Miðlahúsinum. Dialogos skipar fyri. Møguleiki verður at ogna sær bókina *Bible and Ecology* hjá Bauckham umframt aðrar viðkomandi bøkur

## Týsdagin 24.08

11:00 Samrøða við Richard Bauckham í veitsluhøllini á Føroya læraraskúla. Evni: Er nakað frugtagott samstarv ímillum kristnitíman og lívfrøðistovuna møguligt? og aðrir umstríddir spurningar

**20:00 "Hevur skapanin eina framtíð"**
Framløga av Ph.D. verkætlan hjá Poul F. Guttesen, ið herfyri var givin út undir heitinum *Leaning into the Future*.
Fyrilestur: "God's Future for the Whole Creation" – Richard Bauckham
Umframt hetta verður eisini tónleikur á skránni.
Høvi verður eisini at ogna sær bæði nýggju bókina hjá Poul Guttesen og bøkur hjá Richard Bauckham.

## Eitt sindur um Richard Bauckham

Richard Bauckham verður mettur at vera ímillum fremstu gudfrøðingarnar í Bretlandi seinastu 20-30 árini. Hann varð føddur í London í 1946 og fekk p.hd-prógv í søgu frá Cambridge. Í 15 ár undirvísti hann gudfrøði í universitetinum í Manchester. Í 1992 gjørdist hann professari í gudfrøði við universiteti í St. Andrews í Skotlandi. Í 2007 segði hann starvið frá sær og flutti til Cambridge, so hann fekk betri stundir at granska og skriva bøkur.

Akademiskt er Richard Bauckham breiður. Sum gudfrøðingur hevur hann viðgjørt læruna hjá Jürgen Moltmann, kristologi, eskatologi og hvussu gudfrøði hevur samband við náttúruvernd. Sum bíbliufrøðingur hevur hann viðgjørt tríeindina, Opinberingina, Jákupsbrævið, 2. Pætursbræv, Judasarbrævið, jødiskan og kristnan apokalyptiskar skriftir, apokryfurnar, familjuna hjá Jesusi, frumkirkjuna í Jerusalem og hvussu Bíblian relaterar til nýmótans hugsan.

Millum hansara serliga kendu verk eru "Jesus and the Eyewitnesses", sum viðger evangeliini sum eygnavitnisfrásagnir. "God Crucified: Monotheism and Christology in the New Testament" spyr hvussu jødiskir monoteistar kunnu koma til at trúgva at eitt menniskja, Jesus, eisini er Gud. Og stutta bókin, "The Theology of the Book of Revelation", lýsir gudfrøðiliga boðskapin í Opinberingini.

Richard Bauckham kemur til Føroyar í samband við at Poul F. Guttesen, ið skrivaði Ph.D. ritgerð undir leiðlsu Bauckhams, hevur givið ritgerðina út. *Leaning Into the Future* eitur bókin, sum viðger gudfrøðina hjá Jürgen Moltmann við serligum atliti til Opinberingina. Ritgerðin verður løgd fram á serligari móttøku á Læraraskúlanum, har Richard Bauckham eisini skal halda fyrilesturin, "Hevur skapanin eina framtíð?" Hetta verður týsdagin 24. august, kl. 20:00 í veitsluhøllini á Føroya Læraraskúla. Møguleiki verður fyri at ogna sær bæði nýggju bókina hjá Poul Guttesen og bøkur hjá Richard Bauckham.

Dagin fyri móttøkuna, mánadagin 23. august, hevur Richard Bauckham ein fyrilestur í Miðlahúsinum undir heitinum "Trúgv, náttúra og margfelda lívið" Tað er Dialogos, sum skipar fyri. Fyrilesturin er grundaður á nýggjastu bókina hjá Bauckham, sum eitur "The Bible and Ecology". Bókin verður til keyps á staðnum. Hetta verður mánadagin 23. august, kl. 20:00.

Neyvari kunning um Richard Bauckham, hansara gransking og bókaútgávur er á http://richardbauckham.co.uk/